# Útinnan av námsfrøðiligum leiðsluvirksemi í fólkaskúlum í Føroyum

*Jóhannes Miðskarð, PhD og adjunktur í leiðslu á barna-, ungdóms- og serstovnaøkinum á námsvísindadeildini á Fróðskaparsetrð Føroya*

*Í hesi grein verður greitt frá, hvussu fýra skúlaleiðararnir útinna ymisk virksemi, sum ein part av teirra námsfrøðiligu leiðslu. Tað verður greitt frá, hvussu skúlaleiðararnir hava regluligar eftirmetingar av, hvussu tað gongst teimum einstøku næmingunum og teirra flokkum, hvussu skúlaleiðararnir nýta eftirútbúgvingar og skeið til at styrkja um undirvísingarførleikarnar hjá lærarunum, hvussu skúlaleiðararnir nýta samrøður við lærararnar um royndir til at eftirmeta, hvussu tað gongur hjá einstøkum næmingum og flokkum, hvussu skúlaleiðararnir nýta morgunsangin til at styrkja tað sosiala og tað fakliga stigið í skúlanum, og hvussu skúlaleiðarnir styrkja um undirvísing lærarana ígjøgnum fundirnar í námsfrøðiliga ráðnum. Sjálvt um hesir fýra skúlaleiðarar útinna nógv námsfrøðilig leiðsluvirksemi, so verður eisini staðfest, at ongin av skúlaleiðarum hevur ein vælskipaðan yvirorðnaðan leist í teirra námsfrøðiligu leiðslu.*

Í granskingarverkætlaninni "Námsfrøðilig leiðsla í føroyskum fólkaskúlum" setti eg mær fyri, at granska í mununum á uppfatanunum hjá lærarum og skúlaleiðara av námsfrøðiligu leiðsluni hjá skúlaleiðaranum. Høvuðsúrslitið verður lýst í greinini: Miðskarð (in review).

Endamálið við hesari grein er at hugkveikja skúlaleiðarar í Føroyum til at økja um teirra námsfrøðiliga leiðsluvirksemi. Hetta geri eg við at greiða frá dømum, ið eg havi frá mínum interviewum við skúlaleiðarar og lærarar um námsfrøðiligu leiðsluna hjá skúlaleiðarum. Eg knýti hesi dømir saman við viðmerkingum frá útlendskum granskingarbókmentum um útinnan av námsfrøðiligari leiðslu. Hetta kann vónandi

vera við til, at føroyskir skúlaleiðarar hugsa um og fáa hugskot til at víðka sítt virki innan námsfrøðiliga leiðslu.

Skúlamyndugleikar í USA og Danmark hava lagt stóra áherðslu á námsfrøðiliga leiðslu síðani ávíkavist 90'ini og 10'ini (Louis, Leithwood, Wahlstrom, Anderson, Michlin & Mascall, 2010, s. 78; Dyssegaard, Egeberg & Stenberg, 2014, s. 1). Hetta rákið kann sigast júst at vera byrjað í Føroyum við t.d. játtaðan stuðul til hesa verkætlan, og við at Rigmor Dam, núverandi landsstýriskvinna í mentamálum, hevur boðað frá, at í komandi tíð skulu skúlaleiðarar útbúgvast í námsfrøðiliga leiðslu (Dam, 2016). Sjálvt um føroyskir myndugleikarnir ikki áður hava lagt so nógva áherðslu á námsfrøðiliga leiðslu, so vísir henda grein, at skúlaleiðarar útinna nógv ymisk virksemi, ið kunnu bólkast undir námsfrøðiligt leiðsluarbeiði. Hartil er týdningarmikið at undirstrika, at námsfrøðilig leiðsla er nevnd í føroysku fólkaskúlalógini, har tað stendur í § 55, stk. 2, at skúlaleiðarin hevur fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna av skúlanum. Víðari í fólkaskúlalógini eru ymsar ásetingar, ið kunnu sigast at viðvíkja námsfrøðiligu leiðslu, t.d. í §21, stk. 2 stendur, at tað áliggur skúlans leiðslu at tryggja, at flokslærarin og aðrir lærarar floksins ráðleggja og fyrireika undirvísingina, so at allir næmingar kunnu fáa sínar avbjóðingar.

Sum sæst omanfyri er námsfrøðilig leiðsla komin meira í fokus seinastu áratíggjuni, men hvat liggur í hugtakinum "námsfrøðilig leiðsla"?! Í einari kanning hjá Danmarks Evalueringsinstitut (EVA) verður virksemið hjá einum skúlaleiðara býtt upp í fýra leiðsluøki: námsfrøðilig leiðsla, fyrisitingarlig leiðsla, strategisk leiðsla og starvsfólkaleiðsla (EVA, 2006). Út frá hesum sæst, at námsfrøðilig leiðsla ikki er fyrisitingarlig, strategisk ella starvsfólkaleiðsla, men tó er ikki nakað sagt beinleiðis um, hvussu námsfrøðilig leiðsla verður allýst. Robinson (2011) sigur, at í granskingarumhvørinum er stórt kjak um, hvussu "námsfrøðilig leiðsla" skal allýsast; harafturat vera fleiri ymisk heitir nýtt, t.d. læringsleiðsla, næmingafokuserað leiðsla og undirvísingar leiðsla. Eg havi valt at nýta hugtakið "námsfrøðilig leiðsla" í einum breiðum týdningi, sum ta leiðslu, ið ávirkar læraranna námsfrøðiliga/undirvísingarliga

virksemi; hetta kann vera námsfrøðilig leiðsla bæði frá skúlaleiðsluni, frá lærunum og øðrum – men tó er mítt fokus í hesari grein einamest á skúlaleiðaran. Fyri at allýsa "námsfrøðilig leiðsla" meira neyvt, havi eg nýtt hugkveikjan frá Bendikson, Hattie & Robinson (2011, s. 434), til at staðfesta, at útinnan av námsfrøðiligari leiðslu kann býtast í tvey: hvussu skúlaleiðarar útinna teirra námsfrøðiligu leiðslu í mun til dagliga læraranna virksemi, og hvussu skúlaleiðararnir menna organisatoriskar fortreytir, ið stuðla undir, at virksemið verður framt í samsvari við teirra hugsan um námsfrøðiliga leiðslu. Í hesari grein havi eg lagt meg mest eftir at kanna tann fyrra partin, altso hvussu skúlaleiðarar útinna teirra námsfrøðiligu leiðslu í mun til læraranna virksemi.

## Um kanningina

Dáturnar í hesari grein koma frá semistrukturaðum interviewum við skúlaleiðarar og lærarar. Interviewini vóru gjørd og greinað sambært einum fenomenologiskum háttalagi. Harafturat er mítt grundarstøði bygt á hugsanir hjá ástøðinginum Hannu Arendt. (Miðskarð, in review).

Út frá mínum Arendt hugkveikta fenomenologiska sjónarhorni var tað fyrst og fremst avgerandi fyri meg at kanna, hvussu fyribrigdið námsfrøðilig leiðsla verður útint í verki, og hvørjar hugsanir skúlaleiðarar gera um teirra útinnan av námsfrøðiligari leiðslu, t.v.s. at eg kannaði ikki serliga nógv, hvussu skúlaleiðararnir fataðu fyribrigdið "námsfrøðilig leiðsla" sum eitt ástøðiligt hugtak. (Miðskarð, 2012).

Eg havi interviewað fýra skúlaleiðarar og átta lærarar í hesari verkætlaninni. Til tess at varðveita anonymitetin hjá teimum interviewaðu fari eg ikki ígjøgnum hesa grein at eyðmerkja teir einstøku av teimum fýra skúlaleiðarunum ella átta lærarunum við t.d. at nevna teir skúlaleiðari A, skúlaleiðari B o.s.fr. og lærari A1, lærari A2 o.s.fr., sjálvt um eg fleiri ferðir nýti útsøgnir frá teimum somu skúlaleiðarum og lærarum. Harafturat havi eg broytt upp á viðurskiftir, ið vísa seg ikki at hava týdning í greiningini; eitt dømi kann vera, at eg havi broytt í hvørjum faki ein lærari er lærari í. Tað seinasta eg havi gjørt fyri at tryggja anonymitetin er, at eg umtali allar

skúlaleiðarar og lærarar í kallkynsformi, sjálvt um eg bæði interviewaði kvinnur og menn.

Í hesi grein fari eg at lýsa seks ymisk virksemir, ið hesir skúlaleiðarar fremja í teirra námsfrøðiligu leiðslu, onkuntíð úr sjónarhornunum hjá leiðarunum, onkuntíð úr sjónarhornunum hjá lærarunum og onkuntíð úr sjónarhornunum hjá báðum. Í høvuðsheitum fari eg at lata interviewpersónarnar lýsa virksemini sjálvir. Tó fari eg í onkrum ávísum føri at koma við ítøkiligum uppskotum um, hvat kann gerast fyri at betra um ymsu virksemini. Tey seks virksemini eg fari at lýsa eru: regluligar eftirmetingar, lestrarætlanir, eftirútbúgving og skeið, royndir, morgunsangur og námsfrøðiligir fundir.

## Regluligar eftirmetingar

Í hesum brotinum fari eg serliga at lýsa, hvussu tríggir av fýra skúlaleiðarum hava regluligar eftirmetingarfundir, har teir fylgja við, hvussu tað gongur næmingunum uppá ymiskar hættir. Eg nevni eisini stutt til endans, hvat tann fjórði skúlaleiðarin hevur av eftirmetingarsiðvenjum.

Á tí eina skúlanum hava tey eina siðvenju, har flokstoymini tvær ferðir um árið skrivligt eftirmeta, hvussu tað gongur hjá hvørjum einstøkum næmingi í øllum flokkum. Tað gongur fyri seg á tann hátt, at flokslærarin samskipar, at lærararnir í hansara flokstoymi skulu saman útfylla eitt ark víðvíkjandi hvørjum einstøkum næmingi. Á arkinum verður eitt próvtal sett á fyri hvørja lærugrein, síðani verður í samstarvi millum allar lærararnar ein heildarmeting orðað, og til endans verða tað sett eitt ella fleiri mál fyri hvønn einstakan næming. Síðani verða ørkini latin skúlaleiðaranum. Tá eg spyrji skúlaleiðarin um hann síðani hevur ein fund við hvørt flokstoymi um ørkini, fortelur hann, at tað hevur hann ikki, men hann kundi hugsað sær at gjørt tað, men hann er ikki komin har til enn. Men skúlaleiðarin sigur, at hann lesur ørkini og tosar við flokslæraran um eitt ark hjá einum næmingi vísir onkrar serligar trupulleikar.

Tann eini lærarin fortelur, at hesin skúlaleiðarin gongur høgt upp í eftirmetingina við hesum ørkum, og at av og á forklárar skúlaleiðarin fyri lærarunum á fundum, hvussu tey skulu útfylla arkið. Tá eg spyrji um lærarin heldur, at skúlaleiðarin hyggur í ørkini, kemur hetta fram: "*Interviewari: Og følir tú, at hann hyggur í tað, og lesur tað? Lærari: Nei, tað, tað haldi eg ikki, nei. Interviewari: Og fylgir hann upp upp á tað, og snakkar við tykkum um tað? Lærari: nei, nei. Interviewari: Kundi tú tonkt tær tað? Lærari: Ja."* Víðari sigur hesin lærarin, at hann er greiður yvir, at skúlaleiðarin ikki hevur tíð til tað.

Hin lærarin fortelur, at hesi ørkini eru eitt úrslit av, at skúlaleiðarin ynskir eina siðvenju á skúlanum, har tey regluliga eftirmeta, hvussu tað gongst næmingunum. Lærarin fortelur, at skúlaleiðarin viðvíkjandi eftirmeting leggur dent á ymisk virksemi: hesi eftirmetingarørkini, rokniroyndirnar í yngru flokkunum, lesiroyndirnar í yngru flokkunum og landsroyndirnar. Eg spyrji henda læraran, hvat hendir aftaná, at hesi ørkini eru latin inn til skúlaleiðaran: *"Interviewari: Og hvat hendir so aftan á tað?, Lesur skúlaleiðarin tað ígjøgnum og snakkar um tað við tykkum? Lærarin: Ehm ... ja, tað er nakað, sum ikki ordiliga er komið í system, altso, hvat man brúkar tað til kanska endiliga. Men tað, vit hava bara fingið at vita, at tað skal vera, og tað kann takast fram, altso tað skal líka sum dokumenterast, hvat næmingarnir, hvat støði vit halda, at næmingarnir hava. So vissi tað kemur afturumaftur, við tá næmingurin fer víðari í skúla, og man spyr, hví dugir hann ikki at lesa?, Ella, hví dugir hann ikki hatta?, So skal tað líka sum dokumenterast, at vit hava fylgt við. Vit hava fylgt við og eftirmett."* Vit kunnu staðfesta, at hesin lærarin hevur ta uppfatan, at hesi ummælini eru til dokumentatión um okkurt skuldi tikið seg upp seinni. Interviewið heldur fram soleiðis: *"Lærari: Men allíkavæl vil eg siga tað, at skúlaleiðarin fylgir væl við, hvat støði næmingarnir hava. Vissi tað er onkur næmingur, sum hevur trupulleika, so veit hann av tí, og og spyr inn til, og veit. Altso hann fylgir við, hvat hvat støði næmingarnir eru á, serliga vissi tað er onkur sum hevur trupulleikar, sum sagt. Interviewari: So tú hevur inntrykk av, at hann lesur hesi ummælini? Lærari: Ja, ja. Interviewari: Tað verður ikki bara koyrt í skuffuna? Lærari: Nei, tað ..., eg dugi ikki*

*ordiliga at siga, at, um, um hann, um hann brúkar tað til so nógv, men hann lesur tey – tað ger hann".* Mótsætt hinum læraranum hevur hesin lærarin ta uppfatan at skúlaleiðarin lesur ørkini, og at hann tosar við lærararnar, um tað eru onkrir næmingar, ið hava trupulleikar. Meira kann lesast um munir ímillum fatanina hjá skúlaleiðarum og lærarum í Miðskarð (in review). Í hesari grein vísi eg til ymsu útsøgnirnar hjá ymsu lærarunum fyri betra at lýsa aktuella fyribrigdið.

Eg havi omanfyri greitt frá, at á einum av skúlunum, ið eg havi kannað til hesa granskingarverkætlan, gera lærararnir tvær ferðir um árið eina skrivliga eftirmeting av hvørjum einstøkum næmingi. Men eg kundi staðfesta, at hesi ørk verða ikki fylgd upp við einum fundi, men skúlaleiðarin sigur tó, at hann lesur ørkini og tosar við lærararnar um okkurt er órógvandi er í onkrum av ørkunum. Tá eg spyrji um lærararnir halda, at tað er nytta í ørkunum, so eru teir samdir um, at hóast tað er ein ávís mongd av arbeiði av tí, so er tað nyttuligt, tá man er komin í rutinuna at gera tað. Tann eini lærarin sigur "*Eg, eg haldi, at tað er fínasta slag. Tað havi eg, tað havi eg líka sum vant meg til, tí tað gamla ..., eh, tað sum vit høvdu áðrenn, tað var tað, at tað bleiv ikki ordiliga dokumenterað, ella staðfest, hvar næmingarnir flutu. So eg haldi, tað er, tað er fínasta slag, at..at tað verður, tað verður líka sum dokumenterað, hvat hvat vit halda, altso hvat hvat støði næmingarnir eru á."*

Eg vildi mett, at tað er upplagt, at skúlaleiðarin upp á ein meira skipaðan hátt fylgir upp á tað, sum lærararnir skriva í hesum eftirmetingarørkum. Hann kundi havt ein fund við flokstoymini um innlatnu ørkini; hetta nýtist tó ikki at vera hálva hvørt ár, men kundi verið eina ferð um árið.

Nú fari eg at greiða frá, at á einum øðrum skúla hava tey eina siðvenju, har flokstoymini saman við skúlaleiðaranum á fundi eftirmeta, hvussu tað gongst hvørjum einstøkum næmingi eina ferð um árið.

Fyrst skulu lærararnir sita saman í toymunum og fyrireika seg til at tosa um hvønn einstakan næming. Harnæst fara tey øll á fund við skúlaleiðaran, har tað verður mett um, hvussu tað gongst hvørjum einstøkum næmingi. Hetta verður gjørt bæði í mun til

tað fakliga og tað sosiala. Tosað verður um, hvat varð sagt síðsta ár í mun til í ár, serliga hjá teimum, ið hava onkrar trupulleikar, og so verða eisini nakrir framtíðarmálsetningar gjørdir til hvønn einstakan næming. Á fundunum er skúlaleiðarin skrivari, sum skrivar nakrar reglur um hvønn einstakan næming; hetta verður goymt sum dokumentatión í skúlans skjalasavni.

Skúlaleiðarin sigur, at hansara uppgáva er at leiða hesar fundirnar. Og so nýtir hann eisini tilfar frá hesum fundum um t.d. tað skal søkjast um sertímar frá Sernámi til ein næming.

Tann eini lærarin sigur um hesar árligu samrøðurnar: "*tað er í hvussu er ótrúliga gott, (...) og man kann práta um nøkur ting, um hesar næmingarnar, sum man annars ikki ger gjøgnum árið"*. Lærarin nevnir víðari, at hesir fundirnir eru ein trygd fyri, at man ordiliga fær tosa um hvønn næming, tí í gerandisdegnum er ofta nógv rok, og tá er tað ikki altíð, at hann sjálvur ella leiðarin eru nóg varnir við at taka eina sak ordiliga upp. Sami lærari sigur soleiðis um leiklutin hjá leiðarunum: "*og so kanska hoyrir man onkur respons frá [leiðaranum] eisini - ha? "Tú kundi, tú kundi prøva", ella "hevur tú prøvað" ella okkurt sovorðið"*. Hin lærarin sigur, at leikluturin hjá leiðaranum er at leiða fundin, og annars at sita og lurta væl eftir, hvat sagt verður og so spyrja inn til, har teir hoyra at okkurt er áfatt. Lærarin sigur víðari: "*Og so siga vit eisini tá á fundinum, at eg kundi hugsað mær, at hesin næmingurin fekk nakrar stuðulstímar komandi ár."* Lærarin leggur víðari dent á, at leiðarin lurtar væl eftir teimum, og tey gera alt sum tey kunna fyri at skaffa neyðugu stuðulstímarnar.

Tá eg spyrji, um tað verður tikið aftur í eftirmetingina ígjøgnum árið, svarar ein lærari, at eftirmetingin verður nýtt, tá serligar avbjóðingar eru viðvíkjandi einum næmingi; men lærarin ivast eisini í um nokk verður gjørt við at taka afturíaftur, har hann ivast, um tað er hann sjálvur, ið átti at verið meira íðin at gera tað. Hin lærarin sigur eisini, at tað verður fylgt væl upp, men hann sigur ikki, eins og hin lærarin, at meira kundi verið gjørt við at tikið afturíaftur: "*Interviewari: Følir tú, at tað verður fylgt upp, at vissi nú okkurt kemur fram um um onkran næming, sum serligt fokus skal vera á,*

*fylgir so leiðslan akkurát sum upp upp á tað? Lærari: Ja, ja, altso vit, ja, vit eru so tætt, altso vit práta allatíðina. Tað er alla tíðina vit práta, tú veit ha? Tá hava vit verið á fundi um handan har, og tá ið eg so komi til, líka til fríkorter ella eitt ella annað, so so tú veit, so taka vit eitt pikkulítið prát."*

Samanumtikið kann sigast, at bæði skúlaleiðarin og teir tveir lærarar eru glaðir fyri hesa skipan.

Á einum triðja skúla hava tey sum siðvenju, at skúlaleiðarin og lærararnir í hvørjum toymi sær eina ferð um árið á einum fundi tosa saman um toymissamstarvi, undirvísingina og trivnaði í hvørjum einstøkum flokki. Hesir fundirnir vara í umleið 2½ tímar.

Áðrenn fundin verður hvørt toymi biðið um at fylla eitt skjal út, har tey skulu svara upp á ymsar spurningar um teirra toymissamstarv. Hetta skjalið var so nýtt sum útgangsstøði til eitt prát um, hvussu tað gongur í toyminum. Hesin leisturin líkist tí sum verður nevnt TUS, sum stendur fyri "Team Udviklings Samtale" (Nielsen, 2010).

Prátið um undirvísingina tekur støði fyrst í ársætlanini fyri flokkin. Har verður tosað um, hvat lærararnir hava gjørt sær av møguligum ætlanum um útferðir, vitjanir og øðrvísi undirvísingarvikur. Harnæst verður tosað út frá einstøku ársætlanunum fyri fakini; hetta við ársætlunum fyri fakini fari eg at viðgera sum eitt serstakt punkt niðanfyri.

Til endans verður tosað um trivnaðin í flokkinum. Fyrst verður tosað um, hvussu flokkurin virkar sum heild, og so verður tosað um, hvussu tað gongur hjá hvørjum einstøkum næmingi. Skúlaleiðarin sigur, at mangan er freistandi at fara beint til at tosa um einstøku næmingarnar, men hann leggur dent á, at tað er týdningarmikið fyrst at tosa um flokkin sum heild: "*Mær dámar væl at fáa eitt "helikopterperspektiv" upp á flokkin - sum ein hóp altso. Tí vit, sum lærarar, fara sum oftast skjótt til at tosa um einstaklingar."*

Tá hetta er ein miðalstórur skúli, gekk eg út frá at skúlaleiðarin mest lurtaði, tá tosað varð um einstaklingar, men ein lærari sigur: "S*jálvandi, vit hava sera nógvar næmingar, so tað er nógv at halda skil á hjá [leiðaranum], men allíkavæl haldi eg tað, at hann veit rímiliga væl, hvørjir næmingarnir eru, og hann veit eitt sindur til søguna, vissi tað hevur verið okkurt serligt ha?".* Lærarin fortelur víðari: "*hvissi tað er soleiðsnar, at vit siga, at, jamen hesin næmingurin, hann hevur virkuliga brúk fyri hjálp til hettar og hattar, so kemur hann eisini við vegleiðing og ráðum, og sigur, ja, men kunnu tit ikki líka sum prøva at tosa við líka sum handan sosialráðgevarin, ella brúka heilsusystrina, ella okkurt altso, so kemur hann við uppskotinum um, hvat í vit kanska kundu gjørt, hvørjar møguleikar vit hava ha? ella, vissi vit siga tað, at tað er brúk fyri fakligum eh onkrum eyka, altso, at hann so eisini tekur tað upp ha?".* Her síggja vit, at lærarin fortelur at skúlaleiðarin fakliga sparrar lærararnar, og gevur teimum ráð um tey hava onkrar næmingar við trupulleikum.

Báðir lærararnir, ið eg havi tosað við á hesum skúlanum, siga, at teir fáa nógv burturúr hesum árligu eftirmetingarfundum. Men ein lærari sigur tó, at fundirnir kunnu kanska gerast í so drúgvir, og hann skjýtur soleiðis upp: "*[Fundurin] skuldi verið tvær ferð um árið ella okkurt sovorðið? Har tú kanst fylgja upp upp á nøkur ting - ha?"* Um vit fylgja uppskotinum hjá hesum læraranum, so kundi ein fundur snúð seg fyrst og fremst um toymissamstarvi og ársætlanirnar, og so kundi hin fundurin snúð seg fyrst og fremst um trivnaðin sum heild í flokkinum og hjá næmingunum einsæris.

Á einum fjórða skúla, ið er lítil, hevur skúlaleiðarin gjørt sær ein lættan máta at savnað saman øll úrslit av lesiroyndum, rokniroyndum og landsroyndum av hvørjum einstøkum næmingi í einum serstøkum fíli á telduni. Harumframt ger leiðarin notatir í fílin um okkurt er áfatt hjá onkrum einstøkum næmingi, hetta kann vera bæði fakligt og sosialt. Leiðarin fortelur, at einaferð um árið hyggur hann í fíluna og eftirmetir, hvussu tað gongur hjá hvørjum einstøkum næmingi, og síðani tosar hann við avvarðandi lærarar, sum oftast flokslæraran, um okkurt er áfatt hjá einum næmingi.

Southworth (2004A) sigur, at námsfrøðilig leiðsla snýr sum um trý virksemi, ið ein leiðari skal gera: hann skal vera fyrimynd ("modelling"), hann skal fylgja við úrslitum og hvat gongur fyri seg ("monitoring") og hann skal hava samrøður við lærararnar um næmingarnar ("dialogue"). Eftirmetingar-siðvenjurnar hjá teimum fýra skúlastjórunum, ið eg havi lýst omanfyri, har hvør einstakur næmingur verður eftirmettur kann bólkast sum eitt "monitoring"-virksemi hjá Southworth; tað er týdningarmikið fyri Southworth at "monitoring" ikki bert umfatar numerisk úrslit frá royndum, men at onnur viðurskiftir eisini verða tikin við. Eisini kann sigast út frá interviewunum, at hesar regluligu eftirmetingar-siðvenjurnar eru grundarsteinurin undir einum samrøðu-virksemi millum skúlaleiðaran og lærararnar ("dialogue"). Southworth (2004B, s. 10) leggur stóran dent á, at leiðarin má samrøða við lærararnar í "monitoringini", tí, sum hann sigur, so gevur samrøðan okkum møguleika at eftirmeta og menna okkara gerðir í mun til næmingarnar.

## Lestrarætlanir

Í útlendskum bókmentum verður ofta greitt frá, at ein av uppgávunum í námsfrøðiligari leiðslu er at samskifta við lærararnar um lestrarætlaninnir (ársætlanir og undirvísingargongdir) (Blase & Blase, 2004; Glickman, Gordon & Ross-Gordon, 2014; Fink & Markholt, 2011; Zepeda, 2013). Námsfrøðiliga leiðsluarbeiðið viðvíkjandi lestrarætlanunum er fyrst og fremst at sparra lærararnar í teirra arbeiði við at skriva lestrarætlanirnar; tað verður dentur lagdur á, at serliga teir nýggju lærararnir eiga at fáa hjálp til hetta (Robinson, 2011, s. 64 ). Harnæst verður sagt, at skúlaleiðarin eigur ein týðandi leiklut í at fáa lærararnar at reflektera um tað, teir skriva í lestrarætlanum er í samsvari við ta undirvísing, ið verður framd í verki.

Tað skal viðmerkjast beinanvegin, at hesir granskarar siga, at um tað er ein stórur skúli, verður hendan uppgávan við at sparra lærarar viðvíkjandi teirra lestararætlanir, sum oftast, útlutað til millumleiðarar, sum t.d. leiðararnar fyri byrjanardeild, miðdeild og hádeild, ella tey, ið eru ábyrgdarar fyri einstøku fakini.

Tað var bert á tí eina skúlanum í mínum kanningum, at skúlaleiðarin og lærararnir sjálvir natúrligani komu inn á skúlaleiðarans námsfrøðiliga leiðslu í samband við lestrarætlanir. Men av tí at hetta ofta verður nevnt í útlendskum bókmentum um námsfrøðiliga leiðslu, so valdi eg eisini at spyrja hinar leiðararnar um hetta.

Eg kann staðfesta, at leiðslan av lestrarætlanunum er veik í skúlunum í mínari kanning, tí at tað er bert ein skúlaleiðari, ið regluliga nýtir lestrarætlaninar til nakað í sínari námsfrøðiligu leiðslu. Harafturat var tað onkuntíð, at skúlaleiðararnir og lærararnir í mínum interviewum ikki rættiliga kláraðu at gera mun á hugtøkunum: námsætlanir, sum frá landsins síðu lýsa innihaldið og ávegis mál í hvørjum einstøkum faki á hvørjum floksstigi, ársætlanir, sum einhvør lærari skal gera eina ferð um árið fyri hvørja lærugrein í hvørjum av sínum flokkum, og undirvísingargongdir, sum ein hvør lærari skal lata leiðaranum, so hvørt hann er liðugur við undirvísingina í einum høvuðsevni. Hartil er jú eisini ásett, at skúlin skal hava eina ársætlan, ið verður útfylt av skúlaleiðsluni, og so skal hvør flokkur hava eina felags ársætlan, ið verður útfylt av læraratoyminum.[1]

Allir skúlaleiðarar og lærarar, ið eg havi interviewað, halda, at tað er ov umfatandi arbeiði við ársætlanunum og undirvísingingargongdunum – serliga finnast teir at undirvísingargongdunum í yngru flokkunum.

Qvortrup (2015, s. 69) lýsir eina aðra forðing í arbeiðinum við undirvísingargongdum, har hann sigur, at nógvir lærarar hava torført at við leggja um til at nýta førleikamál í staðin fyri vanlig læringsmál. Her sigur ein av skúlaleiðarunum, ið eg havi interviewað, at hann hevur arbeitt júst við hesum: "*Nú er tað førleikamál í námsætlani, tað vil siga, fyrr var tað vanliga soleiðis, at lærararnir søgdu í skúlanum, "ja, vit koma ígjøgnum hasa og hasa bókina". Tað var líka sum at málið var at koma ígjøgnum bøkurnar, men man ikki reflekteraði so nógv um, um næmingurin nú hevði lært tað, hann skuldi. Og tað havi eg roynt at arbeitt við, at tað er altso eru førleikamál í hesari námsætlanni, og ikki eitt skúlabókasystem".*

[1] http://namsaetlanir.net/frymlar-til-arsaetlan

Allir fýra skúlaleiðarar leggja dent á, at ársætlanirnar verða latnar inn áðrenn hálvan september, og teir siga frá, um onkur lærari ikki hevur latið inn. Í teimum eldru flokkunum verður harafturat fylgt við um undirvísingargongdirnar koma inn ígjøgnum ári. Men næstan allir lærararnir halda ikki, at skúlaleiðslan, ei heldur nakar annar, lesur ársætlaninar og undirvísingargongdirnar. Hesar útsøgnir hjá einum lærara eru afturvendandi: *"Interviewari: Og so gert tú ársætlan og undirvísingargongdir? Lærari: Ja. Interviewari: Er tað nakrantíð, at leiðararnir hyggja í í tað, sum tú gert? Lærari: Nei, tað trúgvi eg ikki. Eg haldi, at teir hyggja eftir um tað er komið inn – check check."* Tá eg spurdi skúlaleiðararnar sjálvar, so siga tveir av teimum, at teir partvíst lesa ársætlaninar og undirvísingargongdirnar, meðan tveir siga, at teir ikki lesa tær; sum áður nevnt, so lesur og viðmerkir tann síðsti skúlaleiðarin ársætlaninar og undirvísingargongdirnar til árligu toymiseftirmetingina (meira um hetta seinni).

Tá eg spyrji lærararnar, um teir kundu hugsað sær, at skúlaleiðarin las og viðmerkti ársætlaninar, so svara teir flestu umleið soleiðis: "*Interviewari: Hevði tú kunnað hugsað tær tað, at leiðarin akkurát sum fylgdi eitt sindur við í ársætlanum? Lærari: Ja, tað, tað kundi tað gott verið. Interviewari: Hvussu skuldi tað prátið verið - heldur tú? Lærari: Ja, so skuldi tað verið eitt lítið sindur meir yvirordnað."* Meðan hesin lærarin og flestu av hinum lærarunum kundi hugsað sær afturmelding, so sigur tann eini av lærarunum harafturímóti: "*men eg síggi tað meira sum, at tað sum poengið er í hesum ársætlanunum og námsætlanunum og undirvísingargongdunum, tað er jú fyri eins egna, man hevur tað til. Tað er tann ætlanin, sum eg ætli mær at útføra, og sum eg kann venda aftur til. Hvat er tað sum, hvat var tað sum eg planlegði? og sovorðið ha?"* Til hetta er at siga, at sjálvandi eru ársætlaninar og undirvísingargongdirnar eisini eitt amboð hjá tí einstaka læraranum at eftirmeta sínar ætlaninar, men av tí at tilfarið er skrivligt, meti eg, at tað er upplagt eisini at nýta tað til námsfrøðiligt samskiftið við hinar lærararnar, skúlaleiðaran, foreldrini, næmingarnar og onnur viðkomandi. Í øllum førum er ongin nytta í lestrarætlanunum, um tær bara vera skrivaðar fyri at vera skrivaðar.

Á tí eina skúlanum er tað soleiðis, at fyrri partur av árligu toymissamrøðuni fer til samskifti millum skúlaleiðara og lærarar um undirvísingina. Hetta samskiftið tekur fyrst og fremst útgangsstøðið í ársætlanunum fyri hvørt fakið; til ein ávísan mun verður eisini hugt at undirvísingargongdunum. Hesar ársætlanir og undirvísingargongdir verða tí sendar runt til skúlaleiðarin og hinar toymislimirnar áðrenn fundin.

Tað er leiðarin, sum stýrir prátinum, har hann fokuserar á, hvussu tað hevur eydnast lærarunum at fylgja ársætlanirnar í verki ígjøgnum skúlaárið; eftirmetingarfundirnir liggja tá skúlaárið er hálvrunnið. Skúlaleiðarin sigur somuleiðis, at hann sigur frá, um hann heldur, at ein ársætlan ikki fylgir námsætlaninni.

Tá eg spyrji tann eina læraran, hvat hann heldur um skúlaleiðarans prát um ársætlannina, so sigur hann: *"Tað er eitt eftirlit - ha? Men eg haldi tað er heilt ok, tí tað skal jú eisini konfronterast upp á ein ella annan máta - ha?, Og við at gera tað upp á handan mátan, so fær man jú, hvussu skal man siga, tú fært luftað nøkrum tankum. Og tú fært eh, tú ert, tú ert ikki einsamallur um líka sum allan flokkin, sum man sigur (...)Tí tað eri jú eg, sum geri kanska ársætlanina og og sovorðið ha?, Og tað eru míni orð, so tað er gott, at líka sum fáa fáa opnað har eitt lítið sindur."* Sjálvt um hesin lærarin heldur, at innsendanin og prátið av hansara ársætlan verður framt sum eftirlit, so heldur hesin lærarin tó, at hetta eisini er eitt høvið at tosa um ársætlanina og um sína undirvísing.

Ein annar lærari sigur soleiðis: "S*o spyr [skúlaleiðarin] inn til tey tingini, - altso ikki tað, at hann situr og og nærlesur tað og forhoyrir - , um vit nú hava fylgt ársætlanini, ella um hettar og hattar er gjørt, men so er tað kanska onkur ting, sum vit hava arbeitt við, sum hann heldur vera spennandi, og so spyr hann kanska nærri inn til tað. "Hvussu riggaði tað við tí og tí?" Interviewari: Og hvussu følist tað, at hann spyr um tað? Lærari: Fyri tað mesta haldi eg, altso eg haldi tað, at tað er í lagi, at hann sum skúlaleiðari ger tað, tað vísir eisini tað, at hann hevur fingurin á pulsinum, og veit, hvat gongur fyri seg. Men tað er í høvuðsheitum tey størru fakini, sum føroyskt og*

*rokning sum hann gongur upp í."* Aftur her kunnu vit staðfesta, at hesin lærarin er glaður fyri tað aftursvar, sum hann fær frá leiðaranum viðvíkjandi síni ársætlan.

Omanfyri havi eg víst á tað einasta dømið, eg kom fram á, har man kann siga, at ein skúlaleiðari nýtir lestrarætlanirnar í sínari námsfrøðiligu leiðslu. Út frá bókmentum um námsfrøðiligu leiðslu av lestrarætlanum er vert at undirstrika, at tað er sera týdningarmikið, at um ein skúlaleiðari ætlar at økja sína námsfrøðiliga leiðslu við t.d. at nýta ársætlaninar, so má leiðarin ansa væl eftir, at lærarar ikki uppfata hetta sum eitt einsíðugt eftirlit (Blase og Blase, 2004, s. 165). Heldur eigur ein samrøða rundan um ársætlanir at vera nýtt sum ein liður í at geva lærarunum møguleika at tosa og verða sparraðir í teirra ætlanunum í undirvísingini. Stein & Nelson (2003) ráða til, at um ein skúlaleiðari ætlar at fara undir at nýta lestrarætlanir í sínari námsfrøðiligu leiðslu, so eigur hann at byrja við teimum fakum har hann hevur størstu vitan sjálvur. Sum áður sagt er møguligt, alt eftir støðd á skúlanum, at prát um lestrarætlanir verður útlutað til onnur, t.d. deildarleiðarar og lesivegleiðarar við nógvum royndum.

### Eftirútbúgving og skeið

Tað eru tveir skúlaleiðarar, ið fortelja, at teir í síni námsfrøðiligu leiðslu leggja dent á eftirútbúgving og skeið. Hinir skúlaleiðararnir mæla starvsfólkunum at fara til eftirútbúgving og skeið, men arbeiða ikki so tilvitað við tí sum hesir báðir skúlaleiðararnir.

Tann eini skúlaleiðarin fylgir væl við hvørji skeið, ið Nám bjóðar út, og so eggjar hann ávísum lærarum til at fara á ávís skeið. Hesin skúlaleiðarin heldur eisini, at tað er sera týdningarmikið, at allir lærarar skúlans fáa ta somu undirvísing á einum felagsskeiði eina ferð um árið. Tað er skúlaleiðarin saman við lærarunum, ið finna útav, hvat eitt slíkt felags skeið skal snúgva seg um. Men skúlaleiðarin fortelur, at hann hvørt ár hevur eitt stríð at finna fígging: "*altso problemið er at fáa pengar, vit liggja í hesari her evigu diskussiónini, at kommunan skal ikki betala fyri, altso kommunan vil ikki betala fyri skeið hjá lærarunum. So er tað Mentamálaráðið, ja, har steðgar tað so, tí har verða pengarnir býttir út til Nám."* Sjálvt um tað er eitt stríð hjá

skúlaleiðaranum, so hevur tað eydnast honum at finna pengarnar á hvørjum ári til eitt felagsskeið. Tað er hann sera glaður fyri, tí sum hann sigur: "*Vissi vit skulu flyta nakað her, so mugu vit hava allar lærararnar á staðnum her - at øll hoyra tað sama. Ja, so vit vita, hvat vit snakka um – hava sama málburð um hesi tingini.*"

Skúlaleiðarin fortelur víðari, at hann roynir at taka í aftur evnið ígjøgnum skúlaárið: *"Tað er soleiðis, at vit strekkja tað út. Tú veitst, nú hava vit havt um eitt evnið, og so verður tað so eisini dryppað eitt sindur ígjøgnum árið. Hetta drypparíið er so vigtugt."* Okkurt árið hevur skúlaleiðarin sett lærararnar í arbeiðsbólkar á einum námsfrøðiligum fundi aftaná eitt felagsskeið; í hesum bólkum skulu lærararnir tosað um hvat tey lærdu á skeiðinum, og so skulu tey seta upp nøkur mál í tráð við lærdómin tey fingu á skeiðinum. Á einum fylgjandi fundi skulu bólkarnir síðani eftirmeta, hvussu tað gongst at føra hesi mál út í verkið. Her kann staðfestast, at hesin skúlaleiðarin arbeiðir virkið við at fáa lærdóminum frá einum skeiði til at kjølfesta seg í skúlans gerandisverki, ístaðin fyri at skeið ofta kunnu gerast eingangs fyritøkur (Timperley, 2011, s. 119).

Tað var eisini ein annar skúlaleiðari, ið gongur høgt upp í eftirútbúgving og skeið. Hetta ger skúlaleiðarin upp á fýra ymsar mátar. Fyri tað fyrsta so hevur skúlaleiðarin í umleið 10 ár sett tíð av á ársverkinum til at ein nýggjur lærari altíð hevur ein kontaktpersón í tí fyrstu tíðini fyri at læra seg tað mest grundleggjandi um skúlan; skúlaleiðarin velur hendan kontaktpersón út í mun til høvuðsfakið/ini, ið nýggi lærarin kemur at undirvísa í[2]. Fyri tað næsta, so syrgir skúlaleiðarin fyri at tey fáa onkra undirvísing inni á skúlanum á einum fundi annað hvønn mánað; hetta kann vera framt av einum lærara ella onkrum uttanhýsis persóni. Fyri tað triðja so eggjar skúlaleiðarin til, at onkur av hansaru lærarum tekur longri eftirútbúgvingar, sum t.d. orðblindavegleiðari, støddfrøðisvegleiðari og lesivegleiðari. Fyri tað fjórða so ásetir skúlaleiðarin, at hvør lærari kann sleppa á skeið tríggjar undirvísingardagar um árið (hetta kann vera bæði skeið hjá Námi ella eksternum veitara). Harafturat so vil

[2] Interviewið er framt í 2015 áðrenn skipanin við akkersfólki var sett í verk fyri alt landið.

skúlaleiðarin hava, at tá ein lærari hevur verið á skeiði, so skal hann hava eina lítla framløgu á einum fundi í námsfrøðiliga ráðnum, har hann fortelur um høvuðsinnihaldið, og gevur nøkur hugskot til, hvussu man kann nýta lærdómin í undirvísingini.

Í bókmentum um námsfrøðiliga leiðslu verður stórur dentur lagdur á, at skúlaleiðarar eiga at hava eina tilvitaða ætlan um, hvussu teir eftirútbúgva síni starvsfólk. Blase og Blase (2004, s. 50ff) leggja dent á, at skúlaleiðarar mugu skapa góð kor hjá lærarunum at menna seg professionelt. Blase og Blase (ibid.) siga, at tað er týdningarmikið, at skúlaleiðarar eggja lærunum til luttøku í eftirútbúgvingarskeiðum. Tey siga, at aftaná eitt skeið, so mugu luttakandi lærararnir greiða øðrum lærarum frá teirra úrtøku; tey skjóta upp at lærararnir, ið hava verið á skeið, fortelja sínum toymislimum, hvussu teir ætla at brúka teirra úrtøku av skeiðinum í  mun til onkran ávísan næming ella í mun til júst teirra undirvísing í teirra flokki.

Hopkins (2002, s.  67) nevnir, at tað er sera týdningarmikið, at skúlaleiðarin skipar fyri skeiði, ið er til allar lærarar á skúlanum í senn. Hopkins (2002, s. 83) staðfestir, at tá lærarar fáa eina felags tilgongd innan eitthvørt økið, t.d. ígjøgnum eitt felags skeið, so styrkir tað um fakliga felagsskapin á skúlanum. Hetta er so tann vinningur, ið fyrri skúlaleiðarin fær, tá hann skipar fyri felagsskeiði; eisini fær seinni skúlaleiðarin ágóðan av hesum, tí hann skipar fyri felags undirvísing annan hvønn mánað.

Hini báðir skúlaleiðararnir senda eisini sínar lærarar á eftirútbúgivng og skeið, men hava ikki nakra skipan ella yvirorðnaðar hugsanir um teirra skeiðs- og eftirbúgvingarvirksemi.

### Royndir

Sum eg havi nevnt áður, so sigur Southworth (2004A & 2004B), at ein av uppgávunum í námsfrøðiligari leiðslu er, at skúlaleiðarin eigur at fylgja við í úrslitum av royndum og øðrum líknandi virksemi. Southworth leggur dent á, at skúlaleiðarin eigur at samskifta við lærararnar um dáturnar.

Allir føroyskir skúlaleiðarar fáa dáta frá landsroyndum og próvtøkum. Á flestu skúlum verða harafturat framdar lesiroyndir hjá Sernámi, og nakrir skúlar fremja eisini støddfrøðisroyndir. Tað er vert at nevna, at sambært fólkaskúlalógini hevur skúlaleiðarin eina heilt serliga ábyrgd viðv. landsroyndunum, har hann skal viðgera úrslitini frá landsroyndini saman við einstøku lærarunum og leggja eina ætlan fyri, hvussu neyðugar ábøtur skulu fremjast (§14, stk. 8).

Tann eini skúlaleiðarin nevnir, at hann viðger úrslitini frá lesiroyndum og landsroyndum saman við lærunum. Skúlaleiðarin sigur, at tað er lærarin sum hevur best vitan, so hann letur læraran føra orðið. Tá eg spyrji skúlaleiðarin, um hann samanber við áðurgjørdar royndir svarar hann "*Nei, tað hevur ikki verið neyðugt, tí at lærararnir duga tað uttanat".* Ein lærari sigur um prátið um lesiroyndir og landsroyndir: "*man fær hetta úrslitið, og so vissi tað er onkur serligur næmingur, sum tú veit, sum ikki hevur kláráð seg væl ella okkurt, so verður tað líka tikið upp".* Her síggja vit, at hesin skúlaleiðarin ikki gera nakra djúpa eftirmeting av úrslitunum, við tað at skúlaleiðarin ikki samanber við royndinirnar frammanundan og ei heldur verður farið nakað serligt inn í úrslitini, fyriuttan hjá næmingum sum ikki hava kláráð tað væl. Og hjá hesum næmingum, ið ikki hava kláráð tað væl, verður tað bara "líka" tikið upp, sum merkir at tað verður gjørt skjótt.

Tá eg spurdi ein annan skúlaleiðara um, hvussu hann viðger úrslitini frá landsroyndini, sigur hann: "*Tær plagi eg at analysera rættiliga væl. T.d. í sætta flokki so samanberi eg við hvussu tað gekst í fjórða flokki."* Eftir sítt analýsu-arbeiði, so er skúlaleiðarin klárur at møta lærarunum í toymum: "*Og har havi eg eisini havt góðar royndir av at tikið toymið inn og hugt eftir teimum. Vit hava hugt eftir, t.d. í støddfrøði, hugt eftir einstøkum uppgávum, hvat tað er tey eru ófør til at svara, hvat er kanska minni sterkt. Eisini í føroyskum. Altso eg havi tikið tað sum toymir í staðin fyri einstaklingar. Altso flokstoymi, og eg gjøgnumgangi tað soleiðsnar, at man hevur innlit í tingunum hjá hvørjum øðrum. Og tað haldi eg er fínt, tí tú hevur líka sum hesa distansuna, tú fyriheldur teg til, eg plagi at taka tað uppi á einari stórari talvu. Tú*

*stendur við hesari talvuni og hyggur eftir øllum hesum tølunum og vísir á undranarverd viðurskiftir"*. Skúlaleiðarin leggur dent á, at alt toymið skal vera við til samrøðuna, tí so kann man síggja tvørtur um fakmørk: "*Til dømis ein sum hevur ringt við at lesa. So er tað einki at siga til, at í støddfrøði sæst tað aftur, tí lesingin er veik í føroyskum."* Leiðarin sigur, at tá ábøtur skulu fremjast fyri at stuðla einum slíkum nemingi, so verður gjørd ein felags ætlan, sum allir lærarar eru við til at ávirka. Skúlaleiðarin fortelur eisini, at um tað er neyðugt, so verður samband knýtt til førleikastovuna.

Hesin skúlaleiðarin leggur stóran dent á, at hann hevur eina serliga uppgávu, um ein heilur flokkur hevur klárað seg illa: "*Eg haldi, tað er so vigtugt at taka tað upp og práta um tað, ikki tú veit við peikifingrinum, men hyggja eftir, hvussu sær hetta út altso."* Skúlaleiðarin sigur, at alt annað verður roynt, men hetta kann tó enda við, at ein nýggjur lærari verður settur til flokkin. Men skúlaleiðarin leggur dent á, at hann eisini tekur onnur viðurskiftir inn í eina slíka avgerð, tí *"[landsroyndin] er bara eitt av mongum viðurskiftum, ið hugsast skal um, tá ein slík avgerð skal takast"*.

Tað kann ikki annað enn staðfestast, at tað er ein munur á, hvussu fyrsti og næsti skúlaleiðari omanfyri viðger úrslit frá royndum. Ein forkláring til hendan munin kann vera, at tann fyrri skúlaleiðarin er leiðari á einum minni skúla, meðan tann seinni leiðarin er leiðari á einum stórum skúla. Men vil eg viðmæla, at tann fyrri skúlaleiðarin tó kundi verið hugkveiktur av tí seinna skúlaleiðaranum til eina hollari viðgerð av úrslitunum. Í Rambøll & Dansk Clearinghouse for Uddannelsesforskning (2014, s. 52) verður víst á, at um ein skúlaleiðari skal vera við at hækka støðið á royndarúrslitunum hjá næmingunum, so er neyðugt at leiðarin hevur neyðuga og dagførda fakliga vitan um, hvat skal til fyri at flyta næmingin framá. Hetta kann tykjast sum ein stór uppgáva hjá einum skúlaleiðara, og tí vil eg mæla til at umhugsa, um skúlaleiðarin skal hava lesivegleiðaran og ein royndan lærara í støddfrøði[3] við til hesar fundir við úrslitunum frá lesiroyndum, rokniroyndum og landsroyndum. Síðani

[3] Í løtuni verða útbúnir roknivegleiðarar í Føroyum, sum sjálvsagt eiga at vera við, tá teir eru lidnir.

skal staðiliga undirstrikast, at í allari viðgerð av royndarúrslitum er neyðugt at minnast til, at eitt royndarúrslit er bert ein løtumynd av serstøkum førleikum, tí er neyðugt at draga onnur viðurskiftir inn í eina slíka samtalu, sum t.d. eygleiðingar hjá læraranum gjørdar yvir longri tíðarskeið, samamumtøkur av næmingasamrøðum, næminganna avrik ígjøgnum longri tíðarskeið ella onnur dáta ið geva vitan um næmingana læring og trivnað (Danmarks Evalueringsinstitut, 2015, s. 62).

Eg havi í hesum brotinum bert viðgjørt, hvussu tveir skúlaleiðarar gera viðvíkjandi royndarúrslitum. Hini tveir skúlaleiðararnir søgdu, at teir bert hugdu at úrslitunum, og so góvu teir lærarunum tey við onkrum smærri viðmerkingum.

## Morgunsangur

Hjá trimum av skúlaleiðaranum verður nevnt, at teirra leiðsla av morgunsanginum er ein partur av teirra námsfrøðiligu leiðslu. Ein kann møguliga undrast á, hví leiðsla av morgunsangi verður mett at vera eitt námsfrøðiligt leiðsluvirksemi, men hesir skúlaleiðarar og nakrir lærarar grundgeva hetta við at vísa á, at lærarar hugkveikjast av sosiala og fakliga samskifti skúlaleiðararans undir morgunsanginum samstundis sum morgunsangurin gevur lærarum og næmingum skúlans ein felags samleika.

Á tí eina skúlanum hevur skúlaleiðarin skipað soleiðis fyri, at tríggjar dagar um vikuna er vanligur morgunsangur við einum sálmi og faðir vár, og tveir dagar um vikuna er ein longri morgunsangsløta. Í hesum longri morgunsangsløtum verður afturat faðir vár sungið lættari barnasangir og sungið verður "tillukku til tín" til teir næmingar, ið hava fylt síðani seinast, og so eru framløgur á skránni.

Í framløgunum leggja næmingar og/ella lærarar okkurt fram, sum ein flokkur hevur arbeitt við tað síðsta tíðarskeiði. Hetta kann vera alt møguligt, t.d. ein sangur, ein yrking, ein sjónleikur, ein søga, ein serliga góð tekning, eitt gjørt filmsbrot og eitt roknispæl. Skúlaleiðarin sigur: "*Lærarar sleppa at leggja sítt fram, sum so er inspiratión til hinar lærararnar (...) Lærararnir fáa motivatión og hetta her er vitanardeiling, og at eg aftan á kann siga við teir, at hetta var eitt virkuliga gott projekt*".

Í fyrstani tá skúlaleiðarin byrjaði við hesum framløgunum í morgunsangsløtunum, so gekst ikki so væl at fáa lærarar og næmingar at leggja fram. Skúlaleiðarin sigur: “*Tí at lærarar dáma so øgiliga væl, at hurðin er aftur og man hevur sítt lítla kongaríki har.*” Tí gjørdi skúlaleiðarin eina skipan við einum stafettpinni, ið var handaður víðari til næsta flokk og lærara, aftaná at ein flokkur og hansara lærari høvdu havt eina framløgu. Eftir at nakrar framløgur høvdu verið, so byrjaðu lærarar sjálvbodnir at melda seg til at hava ein framløgu, og tí varð stafettskipanin avtikin nú.

Ein lærari sigur soleiðis um hesar longu morgunsangsløturnar: “Skúlaleiðarin er *komin við tí, at fáa næmingarnar at leggja fram á hasi har løtuni. Og - og tað gera tey so, ella tú veit, tað verður byrjað longu frá 1.flokki av, hvar í tey traðka fram, og sjálvandi, tað kemur alt ann uppá støðið. Ja, summi hava myndir, og summi tekna, og summi lesa, og og tú veit, summi hava havt kanska um Grønland. Interviewari: So tað er okkurt frá tykkara undirvísing? Lærari: Altíð ja, tað er altíð okkurt frá okkara undirvísing. Og hvar í børnini leggja fram. Ja, t.v.s. tað, at vit læra tey longu at líka sum at leggja fram í smáum. Og so sjálvandi er tað trý til fýra sum ikki vilja, so sleppa tey undan. So arbeiðir man við tí, og so næstu ferð, so standa tey har.*”

Tað er ein annar skúlaleiðari, ið eisini skipar fyri morgunsangi. Her verður sungið ein sálmur og so biðið faðir vár. Skúlaleiðarin hevur roynt at fáa ymiskt annað upp at koyra, t.d. at onkur leggur okkurt fram, men tað hevur ikki eydnast. Ein lærari sigur: “*Men [skúlaleiðarin] hevur fleiri ferðirnar lagt upp til, at onkur kemur og traðkar fram við onkrum, at onkur kemur og spælir upp á okkurt blásiinstrument, ella spælir eitt stykki, ella førir okkurt fram, lesur okkurt upp, eina yrking ella okkurt, ein leik. Men tað hevur ikki eydnast.*” Møguliga kundi áðurnevnda stafettpinna-skipanin verið áhugaverd at roynt hjá hesum skúlaleiðaranum.

Sjálvt um hesin skúlaleiðarin ikki fær morgunsangin at eydnast so væl, so hevur tað tó eydnast hesum skúlaleiðarum at orðna soleiðis fyri, at tað vera skipaðir nakrar serligar løtur á ymiskum merkisdøgum, t.d. á grækarismessu og á móðurmálsdegnum. Ein lærari sigur: “*men eg haldi, at skúlaleiðarin er glaður fyri tær løturnar, har tað hendir*

*nakað serligt, og hann heldur øgiliga fast við eisini, at vit hava handan listaleypin".* Eisini sæst í interviewinum, at báðir lærararnir eru glaðir fyri slíkar felagsløtur.

Tað er ein triði skúlaleiðari, ið eisini nevnir, at ein partur av hansara námsfrøðiligu leiðsluvirksemi er at skipa fyri morgunsangsløtunum. Leiðarin gongur høgt upp í morgunssangsløtuna, og at skúlin er væl fyrireikaður at taka ímóti børnunum um morgunin*: "Eg eri her 20 minuttir í 8, tey síggja, at eg komi, geri klárt og alt hettar her ha?, At tey síggja, at at skúlin er, at tað er eitt trygdarpunkt, skúlastjórin er her. Og so vita øll, at tá ið eg ikki eri, so havi eg onkran fyri meg, sum hevur ábyrgdina av tí."*

Hesin skúlaleiðarin hevur gjørt tað soleiðis, at tey syngja sama sálm ígjøgnum eina heila viku: "*Eg orðni fyri, at vit syngja tann sama sálmin í eina viku. Og tú leggur týðiliga merki til, hvussu sangurin fer uppeftir, tí knappliga er tað: "eg kenni handan sálmin", "eg kenni lagið", "eg kenni fleiri og fleiri orð", (...) vissi tú hevur ein sálm her, hendan, handan og handan, tú fært ikki ta somu gleðina."* Undir morgunsanginum steðgar skúlaleiðarin á við ymisk orð í sálmunum, ið eru torfør, og greiðir frá teimum "*altso vissi tú t.d. her tekur sálmin "Stíg seggur oman Golgata", altso hvat er hetta fyri seggur? og sovorðið nakað, hvat er hetta? (...) og ofta taki eg okkurt um skaldið eisini ".* Skúlaleiðarin hevur harafturat ofta eina lítla framløgu undir morgunsanginum. Tað kann verða, at hann hevur eitt útstappað tjaldur við á grækarismessu, og so fortelur hann um tjaldið, og so spælir hann eitt videobrot frá youtube við tjøldrum, ið láta.

Ein lærari á hesum skúlanum sigur: "*Vit hava sikkurt eisini ein tann besta morgunsangin í Føroyum, vissi ikki tann besta ha?! Altso har ið foreldur koma um morgnarnar simpelthen, fyri at sita til morgunsang eina løtu. Tað eru onkrir pápar sum eru sjómenn t.d., teir koma á morgni til skúlan, teir fylgja kanska børnunum, og so seta teir seg til morgunsang, altso tað er sikkurt óhoyrt aðrastaðni - ha? Ein mamma hevur sitið nú tveir morgnar í trekk, og og skriva á Facebook um hendan fantastiska morgunsangin."* Lærarin greiðir frá at ein orsøk til, at morgunsangurin

riggar væl, er tí at móttøkan av børnunum er góð: *"Tá ið næmingarnir koma í skúla um morgnarnar, so eru altíð vaksin fólk at taka ímóti. Fyrr var tað ein vakt til allan skúlan – og tað sóu vit, at tað ber slett ikki til, vit mugu hava eina vakt per flokk. Tað er ein ella tvey vaksin, sum møta kl. 7.30. Og so í øllum hinum flokkunum møta fólk kl. 7.45. Vit fáa eitt sindur í løn frá kommuni fyri hetta arbeiði. Hetta er fyri trivnaðin hjá barninum, meta vit, tað er øgiliga vigtugt, og tað hava vit sæð, at tað, at vit eru har og taka ímóti, tá ið bussurin kemur, so eru vit har, og so kunnu vit steðga konfliktunum nemt áðrenn og sovorðið. Hetta ger, at vit fáa ró yvir skúlan, t.v.s. at vit hava ein øgiligan friðarligan skúla. Og so hava vit eisini gjørt tað, at tá ið fólk fara til morgunsang, so hava vit samlað børnini áðrenn, og so fara tey í rekkjum út til morgunsang. Tey fara ikki alt bara stormandi, men altso, 1. flokkur fer á rekkju, 2. flokkur á rekkju, 3. Flokkur o.s.v., vit hava føst pláss, har vit sita."*

Sum heild kann sigast, at hesir tríggir skúlaleiðararnir síggja teirra skipan av morgunsanginum sum ein part av teirra námsfrøðiligu leiðslu. Skúlaleiðararnir siga, at tá virka teir sum eitt fyridømið fyri, hvussu man ber seg at ímóti næmingunum, og at man eisini er eitt fyridømi fyri, hvussu man lærir frá sær og hvussu man skipar fyri framløgum. Teir tríggir leiðararnir omanfyri eru sera tilvitaðir, um at teir tosa týðiliga og greitt við næmingarnar, t.v.s. at teir skelda ikki. Eisini leggja teir stóran dent á at skapa frið og felags uppmerksemi í morgunsangsløtunum. Ein leiðari sigur: "*Og tá ið eg byrji, so geri eg eitt sovorðið, "ehm ehm", "nú fara vit", "vit eru komin", "nú fer morgunsangurin at byrja". Og so bíði eg faktiskt til hetta her, so "góðan morgun", soleiðis at eg fái hetta signalið, hetta lítla gloppið, sum gevur ró, "nú skal vera friður"."* Ein lærari sigur soleiðis um atburðin hjá sínum skúlaleiðara undir morgunsanginum: "*Morgunsangurin er tann felagsløtan, tá líka sum traðkar hann fram sum leiðari, og engagerar næmingarnar upp á ein øgiliga góðan positivan máta. Hann leggur stóran dent á, at morgunsangurin er góður.*" Hetta við at skúlaleiðarin er ein fyrimynd fyri lærararnar er nakað sum Southworth (2004A & 2004B) leggur stóran dent á. Hann sigur, at lærararnir eygleiða skúlaleiðaran, har teir halda eyga við um leiðarans gerðir eru tær somu yvir longri tíð, og um leiðarin ger tað sum hann

sigur. Southworth (2004B, s. 8) leggur afturat, at effektivir leiðarar vita, at teir verða eftirhugdir, og teir gera brúk av hesum.

### Eygleiðing

Tríggir av fýra skúlaleiðarum siga, at teir ikki skipað vitja undirvísingina; men hesir gera tó óskipaðar vitjanir – sí Miðskarð (in reivew). Tann fjórði skúlaleiðarin sigur, at hann ger rímiliga fastar vitjanir í undirvísingina hjá lærarum. Hesin skúlaleiðarin sigur, at hann steðgar á í umleið 30 min., og so tekur hann beinanvegin aftaná eina samtalu við læraran. Í hesi samtalu fær hann læraran at greiða frá, hvussu hann upplivdi undirvísingina. Skúlaleiðarin sigur, at her hava lærararnir ofta nakað teir skulu sleppa av við - onkrar frustratiónir. Skúlaleiðarin sigur, at í slíkum føri er tað sera týdningarmikið at geva sær góðar stundir at lurta eftir teimum. Hetta er eisini júst nakað, sum námsfrøðiligir ráðgevarar innan dagstovnaøkið siga er ein aðaltáttur í einari góðari vegleiðing (Miðskarð, 2014A & Miðskarð, 2014B). Skúlaleiðarin sigur, at lærararnir kunnu t.d. siga, at teir ikki kláraðu at koma ígjøgnum alt, sum teir ætlaðu sær, tí so var tað Anna, sum gjørdi hatta, og Óli sum gjørdi hatta. Skúlaleiðarin sigur, at hann svarar aftur í sovorðnum føri, at soleiðis er undirvísing, og at tað ger onki um lærararnir fyrireika seg til meira enn tað teir klára, tí so kunnu teir nýta tað aftur í næsta tíma. Harafturat sigur skúlaleiðarin, at hann leggur seg eftir at geva lærunum herðaklapp: “Altso veist tú hvat. Hatta haldi eg tú kláraði ordiliga væl. Tað sum ikki gekk sum tú ætlaði, skalt tú ikki lata fylla for nógv.”

Skúlaleiðarin fortelur, at allir lærarar skúlans og skúlaleiðararnir hava verið á sama floksleiðsluskeiði. Har varð eggja til, at leiðarin fór runt at eygleiða, hvussu lærararnir arbeiddu við teirra floksleiðslu aftan á floksleiðsluskeiðið. Skúlaleiðari D hevur spurt, um hann kann koma út at eygleiða lærararnar, og tað hevur ongin havt nakað ímóti. Hann hevur so avtalað eina tíð við lærararnar, nær hann skal koma út at eygleiða teir, men skúlaleiðarin sigur: ”Men tað er altíð okkurt komið í vegin. So er Sjúrður her ella Hans hevur gjørt okkurt. So verður man skræddur út til okkurt akutt.”

Í Miðskarð (in review) verður neyvari greitt frá eygleiðing, ið verður sæddur sum ein avgerandi táttur í námsfrøðiligu leiðslu skúlaleiðarnna í útlendskum bókmentum (Fink & Markholt, 2011; Abrahamsen & Aas, 2014).

### Námsfrøðiligir fundir

Zepeda (2013, s. 44) staðfestir, at nógvir námsfrøðiligir fundir verða bert nýttir til kunning. Zepeda (ibid.) heldur, at skúlaleiðarar heldur skulu nýta uppsløg, teldupostar, intranet og líknandi til at geva kunning fyri síðan at varpa meira ljós á tað meira námsfrøðiliga á námsfrøðiligu fundunum.

Við hesum omanfyri í huga setti eg mær fyri at kanna, um skúlaleiðarar taka námsfrøðilig evnir upp á fundunum hjá námsfrøðiliga ráðnum. Tað vóru tveir skúlaleiðarar, ið serliga løgdu seg eftir at taka okkurt námsfrøðiligt evni upp, sum eg fari at greiða frá niðanfyri.

Tá eg spyrji tann eina skúlaleiðaran, so svarar hann, at arbeiði í námsfrøðiliga ráðnum er avgerandi í hansara leiðsluarbeiði. Um skúlaleiðarin fær eitt hugskot til at broyta okkurt, so tekur hann tað altíð fyrst fram á einum fundi í námsfrøðiliga ráðnum, og um okkurt kemur fram í orðaskiftinum, ið hann heldur vera skilagott, so broytir hann sítt uppskot tilsvarandi. Skúlaleiðarin roynir eisini altíð at fáa lærararnar at taka okkurt mál upp á fundunum: ”*vissi tað er onkur, ið hevur okkurt upp á hjarta, so royni eg at fáa tey at leggja upp til eitt orðaskifti.*”

Skúlaleiðarin tekur stundum okkurt námsfrøðiligt evni fram á fundunum; hann sigur, at hann regluliga lesur bøkur um námsfrøði, og har finnur hann onkuntíð okkurt hugkveikjandi, ið hann leggur fram til orðaskifti. Somuleiðis tekur skúlaleiðarin okkurt fakligt fram á fundunum. Einaferð setti hesin leiðarin sær til dømis fyri at betra um lesiførleikarnar hjá næmingunum. Tá las hann sjálvur bøkur um evnið, og hann fann eisini eina góða grein, ið hann býtti út til øll at lesa, sum tey so høvdu eitt orðaskiftið um. Í viðgerðini av hesum evninum samskipaði skúlaleiðarin sítt innlegg við at lesivegleiðarin eisini hevði eina framløgu. Síðani vóru lagdar ítøkiligar ætlanir

um at betra um lesiinnlæringina, sum var fylgt upp á nøkrum seinni námsfrøðiligum fundum.

Sum vit hava sæð, so nýtir hesin skúlaleiðarin sera virkið fundirnar í námsfrøðiliga ráðnum. Eisini heldur hesin skúlaleiðarin, at tað er sera týdningarmikið, at lærararnir regluliga fundast í teirra toymum. Tí hevur skúlaleiðarin ásett í ársverkið hjá lærarunum, at teir skulu hava tveir toymisfundir á tveir tímar um mánaðin. Skúlaleiðarin er altíð til staðar á skúlanum hesir tíðir, soleiðis at um lærararnir hava okkurt at orðna við hann, so kunnu tey fáa tað avgreitt beinanvegin. Eisini velur skúlaleiðarin onkuntíð at fara inn á onkran toymisfund, fyri at vita hvussu tað gongur í flokkinum.

Tað kann sigast, at tað, sum skúlaleiðarin her ger við tvungu toymisfundunum, er tað, sum Rambøll & Dansk Clearinghouse for Uddannelsesforskning (2014) kalla fyri, at skúlaleiðarin skapar rúm fyri, at lærarar í toymunum luta um vitan og royndir. Tað kann leggjast afturat, at flest allir granskarar í námsfrøðiligari leiðslu eru samdir um, at toymisarbeiði betrar um námsfrøðiligu góðskuna í einum skúla. Tingleff-Nielsen (2012) hevur tó í sínari gransking víst á, at nógv lærarartoymi ikki koma longur enn at koordinera teirra samstarv, og at í toymunum valdar eitt familjusligt huglag, har fólk ikki tosa um tað, sum hevur veruligan týdning, læringina hjá næmingunum. Í hesum sambandi er tað seinnu árini í altjóða høpi vorðið sera nógv útbreitt, at lærarartoymi verða umgjørd til “Profesional Learning Comunities”/PLC (DuFour, DuFour & Robert Eaker, 2008).

Ein annar skúlaleiðari sigur, at námsfrøðiligu fundirnar á hansara skúla mest snúgva seg um tað, sum er átroðkandi. Dømi um hetta kann vera keðiligur atburður frá ávísum næmingum, ella at tey skulu leggja til rættis eina komandi verkætlan, sum t.d. ein evnisvika. Men hesin skúlaleiðarin og lærararnir hava sett sær fyri at tey á hvørjum fundi “*skulu hava eitt pedagogiskt innkast. Soleiðsnar at onkur hevur ein góðan idé, sum tey leggja fram: “Hetta geri eg, og hetta riggar væl”. Tað kann gott bara taka 5 minuttir. Onkur hevur kanska verið á einum skeiði, so hava tey tað við.*

*Seinast hevði ein lærari okkurt um floksins tíma, okkurt tilfar um tað, og greiddi frá um tað o.s.v."* Skúlaleiðarin sigur, at tað er sjálvboðið at bjóða seg til at leggja fram. Um ongin hevur bjóðað seg fram, so spyr skúlaleiðarin onkran lærara, um hann ikki kann leggja fram um eitt hvørt spennandi, ið hann hevur eygleitt at hesin lærari ger. Skúlaleiðarin sigur, at um ongin lærari hevur nakað at leggja fram, so leggur hann sjálvur okkurt fram. Tá eg spyrji um tað nakrantíð verður tikið nakað fram um lesing, skriving, rokning ella líknandi á námsfrøðiligu fundunum, svarar ein lærari: "*Kanska ikki akkurát á teimum fundunum. Men altso hvørja ferð ein, hvørja ferð nýggir lærarar koma inn til 1. flokk í føroyskum, so havi eg sum lesivegleiðari ein fund við tey. Um hvussu man ger, altso hvat er innan fyri tað nýggjasta innan fyri lesing. Og eg komi við øllum hugskotunum, sum eg havi, tí nú havi eg arbeitt við tí í nógv ár."* Her sæst, at hesin skúlaleiðarin letur tað upp til lesivegleiðaran at taka sær av viðurskiftum, ið viðvíkja undirvísingina í lesing, og at tað ikki verður tikið upp á námsfrøðiligum fundum. Men møguliga kundi hann eins og fyrri skúlaleiðarin álíkavæl tikið okkurt punkt um t.d. lesiinlæring á námsfrøðiligu fundunum, tí lesiførleikin er jú grundarlagið undir virkseminum hjá flest øllum lærarum.

## Endi

Í hesari grein havi eg víst á seks ymisk virksemi, ið fýra føroyskir skúlaleiðarar útinna í teirra námsfrøðiligu leiðslu. Í Miðskarð (in review) viðgeri eg eisini onnur virksemir í námsfrøðiligu leiðslu skúlaleiðaranna. Eg kann staðfesta út frá mínum kanningum, at sjálvt um skúlaleiðarar nevna nógv ymisk námsfrøðilig leiðsluvirksemi, ið teir fremja, so er tað ongin av teimum, sum hevur eitt samlað ella skipað yvirlit yvir, hvørji virksemi, teir framdu í teirra námsfrøðiligu leiðslu. Í byrjanini av interviewunum nevndu skúlaleiðararnir tvey til fýra átøk, ið teir mettu kunnu bólkast sum teirra námsfrøðilig leiðsluvirksemi. Men so hvørt sum interviewini liðu meir og meir, so komu teir við fleiri og fleiri virksemi, ið teir framdu, ið teir eisini søgdu kundu uppfatast sum ein partur av teirra útintu námsfrøðiligu leiðslu. Tað var eisini í nøkrum førum, at onkur lærari fortaldi um virksemi, ið skúlaleiðarin framdi sum ein liður í námsfrøðiligu leiðsluni, sum skúlaleiðarin ikki sjálvur kom framá í hansara interviewi,

men sum eg kundi taka undir við læraranum í, at hetta er ein liður í framdu námsfrøðiligu leiðsluni hjá skúlaleiðaranum. Alt hetta vísir okkum, at skúlaleiðararnir ikki eru so væl skipaðir í teirri námsfrøðiligu leiðslu, men tó má tað staðiliga undirstrikast, at teir gera nógv ymisk virksemi, ið kunnu bólkast undir námsfrøðiliga leiðslu.

Tað er ikki bert í Føroyum, at leiðarar ikki eru so skipaðir í teirra útinnan av námsfrøðiligu leiðsluni. Kruger (2003, s. 211) ger eina niðurstøðu frá einum granskingarverkætlan í Suður Afrika, at teir skúlaleiðararnir hann kannaði, ikki vóru so skipaðir í teirra námsfrøðiligu leiðslu. Kruger (ibid. ) heldur at orsøkin er, at leiðarunum vantar tíð til at fremja námsfrøðiliga leiðslu, og harafturat vantar teimum eina fatan av hesi uppgávu. Somuleiðis sigur Richard Elmore, at í Amerika útinna skúlaleiðarar ikki námsfrøðiliga leiðslu serliga skipað, av tí at teimum vantar tíð og førleikar til tað (Olson, 2000).

Eg havi ikki kannað um teir føroysku skúlaleiðararnir halda, at teir hava ov lítla tíð til námsfrøðiliga leiðslu. Viðvíkjandi at fáa fleiri førleikar er hetta ikki nakað, sum gerst eftir einum degi, men tað kundi tó verið ein byrjan at skúlaleiðarar funnið sær ein yvirorðnaðan leistð sum teir arbeiddu eftir. Tað finnast ymiskir yvirordnaðir leistar, sum royna at tryggja, at ein skúlaleiðari kemur inn um øll neyðug viðurskiftir í sínari námsfrøðiligari leiðslu. Eg fari í einari seinni grein at greiða frá trimum slíkum yvirskipaðum leistum.

## Bókmentir


Abrahamsen, H. & Aas, M. (2014). Avdelingsledere - en ny profesjon innenfor skoleledelse? Í E. Elstad & K. Helstad (ritstj.), *Profesjonsutvikling i skolen* (s. 300-314). Oslo: Universitetsforlaget.

Blase, J. & Blase, J. (2004). *Handbook of Instructional Leadership – How Succesfull Principals Promote Teaching and Learning (2. útgáva)*. Thousand Oaks: Corwin Press.

Bendikson, L., Hattie, J. & Robinson, V. (2011). Identifying the comparative academic performance of secondary schools. *Journal of Educational Administration, 49*(4), 433 – 449.

Dam, R. (2016). *Røður 2016 - Aðalfundur Føroya Lærarafelags*. Tikið niður 16.08.16 frá http://www.mmr.fo/um-radid/landsstyriskvinnan/rodur-greinar/rodur-2016/adalfundur-foroya-laerarafelags-16-april-2016/

Danmarks Evalueringsinstitut (2015). *Ledelse tæt på undervisning og læring*. Keypmannahavn: Danmarks Evalueringsinstitut.

DuFour, R., Dufour, R. & Eaker, R. (2008). Revisiting professional learning communties at work: New insights for improving schools. Bloomington: Solution Tree.

Dyssegaard, C. B., Egeberg, J. & Steenberg, K. (2014). Forskningskortlægning – pædagogisk ledelse. Keypmannahavn: Rambøll.

EVA (2006). *Skoleledelse i folkeskolen*. Keypmannahavn: Danmarks Evalueringsinstitut.

Fink, S. & Markholt, A. (2011). *Leading for Instructional Improvement – How Successful Leaders Develop Teaching and Learning Expertise*. San Fransisco: Jossey-Bass.

Glickman, C. D., Gordon, S. P. & Ross-Gordon, J. M. (2014). *SuperVision and Instrucional Leadership – A Developmental Approach (9. útgáva)*. Boston: Pearson.

Kruger, A. G. (2003). Instructional leadership: the impact on the culture of teaching and learning in two effective secondary schools. *South African Journal of Education, 23*(3), 206 – 211.

Hopkins, D. (2002). Instructional Leadership and School Improvement. Í A. Harris, C. Day, D. Hopkins, M. Hadfield, A. Hargreaves & C. Chapman, *Effective Leadership for School Improvement* (s. 55-71). London: Routledge.

Louis, K. S., Leithwood, K., Wahlstrom, K. L., Anderson, S. E., Michlin, M., & Mascall, B. (2010). Learning from leadership: Investigating the links to improved student learning. *Center for Applied Research and Educational Improvement/ University of Minnesota and Ontario Institute for Studies in Education/University of Toronto*, *42*(50).

Miðskarð, J. (in review). Discrepancies between principals' and teachers' perspectives of how the principals carry out their pedagogical leadership.

Miðskarð, J. (2012). *Action and thinking. An investigation of how social workers' consulting sessions influence school professionals' further perspectives on issues in vulnerable children's lifeworlds.* Ph.d.-ritgerð á Institut for Psykologi og Uddannelsesforskning, Roskilde Universitet. Tikið niður 14.10.2016 frá http://diggy.ruc.dk:8080/bitstream/1800/13000/1/Midskard_2012A.pdf

Miðskarð, J. (2014A). Aðaltættirnir í námsfrøðiliga ráðgeving. Tórshavn: Føroya Pedagogfelag. Tikið niður 14.10.2016 frá http://www.pedagogfelag.fo/uploads/media/Adaltaettirnir_i_namsfroediligum_radgevingum

Miðskarð, J. (2014B). Tann væleydnaða ráðgevingargongdin. Tórshavn: Føroya Pedagogfelag. Tikið niður 14.10.2016 frá http://www.pedagogfelag.fo/uploads/media/Tann_vaeleydnada_namsfroediliga_radgevingargongdin

Nielsen, K. M. (2010). Teamudviklingssamtalen. Í F. Borch og A. Molly (ritstj.), *Skolelederens strategiske samtaler –om systemisk anerkendende ledelse i skolen* (s. 87-103). Frederikshavn: Dafolo.

Qvortrup, L. (2015). Skoleledelse efter folkeskolereformen. Í J. Rasmussen, C. Holm & Rasch-Christensen (ritstjr.), *Folkeskolen – efter reformen* (s. 61-78). Keypmannahavn: Hans Reitzels Forlag.

Rambøll og Dansk Clearinghouse for Uddannelsesforskning (2014). *Forskningskortlægning – pædagogisk ledelse*. Keypmannahavn: Rambøll og Dansk Clearinghouse for uddannelsesforskning.

Robinson, V. (2011). *Student-centered Leadership*. San Francisco: Jossey-Bass.

Southworth, G. (2004A). *Primary School Leadership in Context – Leading small, medium and large sized schools*. London: RoutledgeFarmer.

Southworth, G. (2004B). *Learning-centred Leadership: Towards personalised learning-centred leadership*. Notthingham: NCSL.

Stein, M.K. & Nelson B.S. (2003). Leadership content knowledge. *Educational Evaluation and Policy Analysis, 25*, 423-448.

Timperley, H. (2011). Leading teachers' professional learning. Í J. Robertson & H. Timperley, *Leadership and Learning* (s. 118-130). London: Sage.

Tingleff-Nielsen, L. (2012). Teamsamarbejdets dynamiske stabilitet: en kulturhistorisk analyse af læreres læring i team: PhD Afhandling. Emdrup: Aarhus Universitet, Institut for Uddannelse og Pædagogik.

Zepeda, S. J. (2013). *The principal as instructional leader – a practial handbook (3. útgáva)*. New York: Routledge.